# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Hjarnar Johannesen** verður úr Vestmanna kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hjarnar, kunnu lata eina peningagávu til Berin - Sjálvhjálpabólkar fyri børn ið hava mist; konta í Føroya Banka.

**Jóhan Martin Johannesen** andaðist á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi mánadagin 18. desember, 81 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík í dag kl. 18. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jóhan Martin, kunna lata eina gávu til Tofta Ítróttafelag; konta í peningastovnunum.

**Frede Benjaminsen á Nesi** andaðist mánadagin 18. desember, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni klokkan 13 fríggjadagin. Tey, ið vilja minnast Frede kunnu lata Fríðrikskirkjuni eina gávu.

Klaksvíkar Sjómansskúli:

# Skipskokkar fingið prógv



Hesi hava í vetur gingið til skipskokk á Klaksvíkar Sjómansskúla: Jóhan Joensen, Bjarni Søesnsen, Jonly Johannesen, Josefina Jacobsen, Leif á Stongunum, Anny Johannesen, Hallur Jacobsen, Jens Dam og Erik Kjeld

Virðislønir fyri gott avrik fingu: Josefina Jacobsen (frá Norðoya Sparikassa), Jóhan Joensen (frá Norðoya Sparikassa), og Bjarni Sørensen (frá Klaksvíkar Sjómansskúla).

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði sonur og beiggi okkara

**Hjarnar Johannesen**

Vestmanna

andaðist mánadagin 18. desember , 4 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju fríggjadagin kl. 13.00

*Familjunnar vegna*

**Kirstin, Sofus, Rókur og Ronja**

Tey, ið ynskja at minnast Hjarnar, kunnu lata eina peningagávu til Berin: Sjálvhjálparbólkar fyri børn, ið hava mist. Konta í Føroya Banka

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra systir okkara

**Ása Olsen**

fødd Meitilberg,
úr Havn, búsitandi í Keypmannahavn

andaðist á Kong Frederiks den IV hjem tann 17. desember, 74 ára gomul.

*Fyri tey avvarðandi*

**Elby og Winny**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust til mín á 70 ára føðingardegnum, við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Heilsan Johan Eli Lisberg**

## Tøkk

Øllum tykkum, ið mintust meg á 80 ára degnum, takki eg hjartaliga. Samstundis ynski eg ætt, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

**Kærar heilsanir**
**Kathrina Lognberg**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymsan hátt gjørdu 90 ára føðingardg mín tann 16. desember so hugnaligan, og ynski annars familju og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Nancy Vesturbú**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 80 ára degnum 23. august. Takk, øll tit, sum komu inn á gólvið føðingardagin. Tøkk til tykkum, sum ringdu bæði innan- og uttanlands. Eisini takki eg øllum tykkum mongu, sum komu í pensionistahúsið at hátíðarhalda dagin saman við okkum. Ein serstøk heilsan til Torbjørn, Steindor, Harald og Bjartur: takk fyri tykkara vakra sang og spæl. Stóra tøkk til tykkum í familjuni, sum gjørdu, at alt eydnaðist so væl. Harrin signi tykkum øll. Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Jógvan (Egga) Rasmussen, Strendur**

**Dagurin**

**22. desember. Japetus.** Ókent halgimenni, men kanska hevur hann navn eftir Jafeti, soni Nóa. Sólstøður, stytsti dagur.